tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12-2019 |
| Fundardagur | 11. september 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Møtt:Anita Vibergsdóttir, Bogi Johannesen, Súsanna Bertholdsen, Alvi Mortensen, Kristina Roest, Annika Pearce, Anfinn Leo
Skrivari:Lasse Jensen

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar


| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 1 | Skattainntøkur 2019 | 2 |
| 2 | Integratiónspolitikkur | 2 |
| 3 | Fíggjarætlan 2020 fyri Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy | 3 |
| 4 | Eldávaringarskipan til Tvøroyrar Skjalasavn | 4 |
| 5 | Umsókn um endurnýggjan av matstovuloyvi, útskeinkingarloyvi v.m. til Sp/f Gl. Kgl. Handil á Tvøroyri - 2019 | 5 |
| 6 | Tvøroyrar Klubbi - Umsókn til ummælis um matstovuloyvi, skeinkiloyvi og alment loyvi 2019 | 6 |
| 7 | Umsókn um lán av hølum - Froðbiar Sóknar Róðrarfelag | 7 |
| 8 | Seyðaóskil í Øravíkarlíð | 7 |
| 9 | Fyrispurningur viðv. um borgarstjóri ella kommunustýrislimur, umboðandi kommununa í einum kommunalum samstarvi, er bundin av samtyktum í kommunustýrinum | 8 |
| 10 | Loyvi borgarstjórans at virka sum borgarstjóri og løgtingslimur | 9 |

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12-2019 |
| Fundardagur | 11. september 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**25.20.00-Ø00-1-19**

## 1. Skattainntøkur 2019

### Málsfrágreiðing

**Fíggjarnevndin, 26. august 2019, pkt. 1:**
Hesin fundurin verður útsettur.

**Fíggjarnevndin, 5. september 2019, pkt. 1:**
Kunningin er tikin til eftirtektar.

### Avgerð

Kunning góðtikin.

### Skjøl

- Samanbering av skatti 2018-2019.xlsx
- Skattur 2019 - til aug..pdf

**15.40.00-1-18**

## 2. Integratiónspolitikkur

### Málsfrágreiðing

**Mentanarnevndin, 3. september 2018, pkt. 11:**
Umsitingin kannar, hvørjar politikkir aðrar kommunur hava á økinum.

**Mentanarnevndin, 19. august 2019, pkt. 2:**
Málið verður útsett til komandi fund.

**Mentanarnevndin, 2. september 2019, pkt. 2:**

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12-2019 |
| Fundardagur | 11. september 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Súsanna Bertholdsen skýtur upp, at hava ein arbeiðsdag um integratiónspolitikk fyri alt býráðið, har viðkomandi umboð verða bjóðað við, t.d. Rúna Preeti Ísfeld og David Im.
Nevndin tekur undir við uppskotinum og málið verður beint í býráðið.

Uppskot frá mentanarnevndini um at hava ein arbeiðsdag um integratiónspolitikk fyri alt býráðið, har viðkomandi umboð verða bjóðað við, t.d. Rúna Preeti Ísfeld og David Im.

### Avgerð

Súsanna Bertholdsen greiddi frá um uppskotið frá mentanarnevndini.
Málið verður beint aftur í mentanarnevndina, og verður tikið uppaftur, tá ið ein kommunustjóri er settur.

### Skjøl

- Yvirlit

**00.17.15-S00-2-19**

## 3. Fíggjarætlan 2020 fyri Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy

### Málsfrágreiðing

**Fíggjarnevndin, 5. september 2019, pkt. 12:**
Fíggjarnevndin heitir á býráðið um at fáa eina útgreinaða fíggjarætlan.

### Avgerð

Býráðið ynskir at fáa eina útgreinaða fíggjarætlan frá Bú- og heimatænastuni.

### Skjøl

- Fíggjarætlan 2020 - 1 uppskot.pdf

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo
Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12-2019 |
| Fundardagur | 11. september 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**82.18.00-G01-1-15**

## 4. Eldávaringarskipan til Tvøroyrar Skjalasavn

### Málsfrágreiðing

**Mentanarnevndin, 3. juni 2019, pkt. 6:**
Málið verður útsett til tilboðini eru innkomin.

**Mentanarnevndin, 19. august 2019, pkt. 4:**
Málið verður útsett til komandi fund, tí tilboðið ikki fyriliggur skrivliga enn.

**Mentanarnevndin, 2. september 2019, pkt. 1:**
Ragnar J. Guttesen, býarverkfrøðingur, og Kári Jespersen, søgufrøðingur, vitjaðu nevndina.

Kári segði, at tað skjalasavnið hevur biðið um her og nú, er ein ávaringar- og køvingarskipan.

Tilmælið frá forkvinnuni, Súsannu Bertholdsen, er at penningurin verður funnin til at útvega neyðugu ávaringarskipanina, sum er kravd fyri at skjalasavnið kann vera í bygninginum.
Nevndin tekur undir við hesum.

**Fíggjarnevndin, 5. september 2019, pkt. 13:**
Nevndin mælir til at finna pengarnar til eina eldávaringarskipan, áleið 200.000 kr.
Uppskotið um at eldbjálva v.m. verður støða tikin til í sambandi við viðgerðini av fíggjarætlanini fyri 2020.

### Avgerð

Einmælt samtykt at málið verður beint aftur í mentanarnevndina, orsakað av, at viðkomandi upplýsingar komu fram á fundinum um manglandi upplýsingar viðv. tilboðnum

### Skjøl



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12-2019 |
| Fundardagur | 11. september 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

- Teldupostur frá Ragnar Guttesen
- skjalasavn - mgulig umvæling
- Teldupostur til Ragnar Guttesen
- Tilbud på ABA september 2018

**14.12.16-K00-1-19**

## 5. Umsókn um endurnýggjan av matstovuloyvi, útskeinkingarloyvi v.m. til Sp/f Gl. Kgl. Handil á Tvøroyri - 2019

**Málsfrágreiðing**

**Fíggjarnevndin, 26. august 2019, pkt. 14:**
Hesin fundurin verður útsettur.

**Fíggjarnevndin, 5. september 2019, pkt. 15:**
Bjarni Hammer fór av fundinum undir viðgerðini av hesum máli.

Nevndin mælir til, at matstovuloyvið og útskeinkingarloyvið til Gl. Kgl. Handilin (Pubbin) verður endurnýggjað.

**Avgerð**

Einmælt samtykt at viðmæla, at matstovuloyvið og útskeinkingarloyvið til Gl. Kgl. Handilin (Pubbin) verður endurnýggjað.

**Skjøl**

- Brunavattan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12-2019 |
| Fundardagur | 11. september 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**22.01.01-G00-1-19**

## 6. Tvøroyrar Klubbi - Umsókn til ummælis um matstovuloyvi, skeinkiloyvi og alment loyvi 2019

### Málsfrágreiðing

**Fíggjarnevndin, 26. august 2019, pkt. 3:**
Hesin fundurin verður útsettur.

**Fíggjarnevndin, 5. september 2019, pkt. 16:**
Bjarni Hammer fór av fundinum undir viðgerðini av hesum máli.

Nevndin mælir til, at endurnýggja matstovuloyvið, skeinkiloyvið og alment loyvi til Tvøroyrar Klubba (sp/f 13-15).

### Avgerð

Einmælt samtykt at viðmæla, at endurnýggja matstovuloyvið, skeinkiloyvið og alment loyvi til Tvøroyrar Klubba (sp/f 13-15).

### Skjøl

- VS: Skriv í sambandi við, at skeinkiloyvið gongur út - Tvøroyrar Klubbi / 13-15 Sp/f
- Klubbin-nýggj-mynd
- Tekningarútskrift-spf13-15.pdf
- Taks-váttan-
- Taks-váttan-13-15.jpeg
- Skrasetingarprogv 13-15 Spf.pdf
- skeinkiloyvi-umsóknarblað-2019.dotx
- Dópsattest-
- alment-loyvi-umsóknarblað-2019.dotx
- 13-15 Rgn 18 SKF.pdf
- image001_689.jpg
- Umhvørvis- og brunaváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12-2019 |
| Fundardagur | 11. september 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**82.16.00-G00-4-19**

## 7. Umsókn um lán av hølum - Froðbiar Sóknar Róðrarfelag

### Málsfrágreiðing

**Mentanarnevndin, 2. september 2019, pkt. 6:**
Mælt verður til, at FSR sleppur at nýta hølini hjá kommununi í Postabygninginum í heyst og vetrarhálvuni 2019/20.
Umsitingin tekur sær av at kunna nevndina um avgerðina og bjóðar inn til ein fund, har praktisk viðurskifti verða avtalað.
Eisini verður avtalu gjørd um vasking av hølunum.

**Fíggjarnevndin, 5. september 2019, pkt. 14:**
Samtykt at tosa við FSR og Anton Øster um møguleikan fyri at venja í Ítróttardeplinum við Stórá.

### Avgerð

Einmælt samtykt, at fylgja tilmælinum frá Mentanarnevndini, at FSR sleppur at nýta eitt høli hjá kommununi í Postabygninginum í heyst og vetrarhálvuni 2019/20.
Viðurskiftini skulu skipast viðv. atkomu og lyklum, og vasking.

### Skjøl

- FSR Umsókn at lána hølir 29-08-2019.docx
- VS: FSR

**09.17.01-G01-1-18**

## 8. Seyðaóskil í Øravíkarlíð

### Avgerð

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12-2019 |
| Fundardagur | 11. september 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Einmælt samtykt, at koyra málið í Teknisku nevnd, og at heita á umsitingini um at bjóða hagaeigararnar í Øravík á fund við Teknisku nevnd.

### Skjøl

- Adressa frá borgarum í Líðini
- Notat frá Kristin Michelsen

**00.24.00-A00-2-19**

## 9. Fyrispurningur viðv. um borgarstjóri ella kommunustýrislimur, umboðandi kommununa í einum kommunalum samstarvi, er bundin av samtyktum í kommunustýrinum

### Avgerð

Tilmæli frá Súsannu Bertholdsen um at býráðið heitar á stýrið í Bú-og heimatænastuni um viðgera málið "Eldrabústaðir sum felags ogn og keyp av sambýlinum við Sílánna", av nýggjum.

Tilmælið samtykt við 5 atkvøðum fyri og 2 avkvøðum í móti.
Annika Pearce, Bogi Johannesen, Súsanna Bertholdsen, Kristina Roest og Anfinn Leo atkvøddi fyri.
Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøddi ímóti.

Tilmæli frá Súsannu Bertholdsen um at býráðslimir (herundir borgarstjórin) , ið umboðar kommununa í interkommunalum samstørvum, skulu atkvøða sambært býráðssamtyktum, har býráðssamtyktir fyriliggja.

Tilmæli frá Anitu Vibergsdóttir um at fáa vegleiðing frá KF og frá kommunala eftirlitinum um hvussu reglugerðirnir eru í sambandi við at binda býráðslimir til at atkvøða sambært býráðssamtyktum í interkommunalum samstørvum.

Fyrst var atkvøtt um tilmælið hjá Anitu Vibergsdóttir:
Tilmælið fall við 2 atkvøðum fyri og 5 avkvøðum í móti.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 12-2019 |
|---|---|
| Fundardagur | 11. september 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Annika Pearce, Bogi Johannesen, Súsanna Bertholdsen, Kristina Roest og Anfinn Leo atkvøddi í móti.
Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøddi fyri.

Kristina Roest viðmerkir, at HIMR hevur longu úttalað seg um málið, umframt at minnilutin hevur ráðført seg við Eyðbjørn Larsen Adv., uttan heimild frá meiralutinum.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið hjá Súsannu Bertholdsen:
Tilmæli frá Súsannu Bertholdsen um at býráðslimir (herundir borgarstjórin) , ið umboðar kommununa í interkommunalum samstørvum, skulu atkvøða sambært býráðssamtyktum, har býráðssamtyktir fyriliggja.

Tilmælið samtykt við 5 atkvøðum fyri og 2 avkvøðum í móti.
Annika Pearce, Bogi Johannesen, Súsanna Bertholdsen, Kristina Roest og Anfinn Leo atkvøddi fyri.
Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøddi ímóti.

**Skjøl**

- Skriv frá HIMR
- Øll skjøl

**00.01.10-G00-1-17**

## 10. Loyvi borgarstjórans at virka sum borgarstjóri og løgtingslimur

**Málsfrágreiðing**

**xxx mælir til, 29. december 2018, pkt. 7:**

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12-2019 |
| Fundardagur | 11. september 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Býráðið, 29. december 2018, pkt. 7:**
Kristina Roest viðmerkir, at hon ynskir at vita, hvat endamálið var við at biðja ein sakførara kanna gegnið hjá Kommunala Eftirlitinum og um tað er Tværyorar Kommuna ella borgarstjórin sjálvur, ið kærir Kommunala Eftirlitið.

Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen ynska viðmerkt, at býráðið hevur 13. februar 217 játtað borgarstjóranum at vera borgarstjóri og løgtingslimur, og tann játtanin, eins og undanfarnar játtir um sama frá 2012 og 2016 ,var fyri alt valskeiðið. Tí meta tey ikki, at tað er rætt uttan víðari at afturkalla hesa játtan nú. Hartil meta tey hetta ikki vera rætt, tá tað er ivasamt sambært kommunustýrislóggávuni, um slík játtan til borgarstjóran uttan víðari kann verða broytt ella tikin aftur. Tey halda samanumtikið ikki, at nøkur orsøk eru fyri, stutt áðrenn løgtingsvalskeiðið endar, at afturkalla loyvið til borgarstjóran at sita sum tinglimur, meðan hann er borgarstjóri. Hartil er borgarstjórin ikki hoyrdur í málinum av býráðnum, áðrenn avgerð er tikin. Tað er ikki rætt fyrsitingarliga. Slík afturkalling ikki at verða uttan við hóskandi uppsagnarfreist, minsta lagi 6 mánaðir, meta tey, men atlit er ikki tikið til hetta heldur.

Súsanna Bertholdsen ynskir viðmerkt, at sambært Heilsu- og innlendismálaráðnum er ein samtykt galdandi til ein nýggj samtykt er tikin í einum máli.

Súsanna Bertholdsen mælir til, at tilsøgnin ið var givin borgarstjóranum hin 13.02.2017 um at røkja bæði borgarstjórasessin og løgtingssessin, verður tikin aftur.

Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen mæla til, at loyvið at virka sum borgarstjóri og løgtingslimur givið borgarstjóranum hin 13.02.2017 stendur við.

Atkvøðugreiðsla um tilmælið frá Anitu Vibergsdóttir og Alva Mortensen: Tvær atkvøður fyri, fýra atkvøður ímóti. Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøddu fyri, Bjarni Hammer, Bogi Johannessen, Súsanna Bertholdsen og Kristina Roest atkvøddu ímóti, tilmælið fallið.

Atkvøðugreiðsla um tilmælið frá Súsonnu Bertholdsen: Fýra atkvøður fyri, tvær atkvøður ímóti. Bjarni Hammer, Bogi Johannessen, Súsanna Bertholdsen og Kristina Roest atkvøddu fyri, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøddu ímóti. Tilmælið samtykt við fýra atkvøðum fyri og tveimum atkvøðum ímóti.

**Avgerð**

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12-2019 |
| Fundardagur | 11. september 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Tilmæli frá meirilutanum:
Vísandi til býráðssamtykt frá 29. desember í 2018, um loyvi borgarstjórans at virka sum borgarstjori og løgtingslimur, vilja okur boða frá at okkara avgerð stendur við. Og nú nýtt løgtingsval hevur verið, boða vit frá at borgarstorin fær ikki tilsøgn frá meirilutanum um virka sum borgarstjori og løgtingslimur. Sæð í ljósinum av hvussu leingi málið hevur tikið, og at borgarstjórin ikki hevur virt/eftirlíkað okkara avgerð frá 29. desember í 2018, mæla vit til, at lata Jógvan Páll Lassen, adv. um at taka sær av málinum víðari. Og eftirsum at hetta snýr seg um borgarstjóran, skal meirilutin, heimilast til at samskifta beinleiðis við Jógvan Páll Lassen um málið.

Tilmælið samtykt við 4 atkvøðum fyri og 2 avkvøðum í móti.
Annika Pearce, Bogi Johannesen, Súsanna Bertholdsen, Kristina Roest atkvøddi fyri.
Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøddi ímóti.

Anfinn Leo atkvøddi ikki.

Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen viðmerkja, at málið varð avgreitt á býráðsfundi 29. desember 2018, og liggur hjá Innlendismálaráðnum, tí eitt givið loyvið frá býráðnum 13. februar 2017 kann ikki takast aftur uttan grundgeving og uttan hoyring, tað má ganga rætt fyri seg fyrisitingarliga.

## Skjøl

- Skriv frá HIMR til Kristinu Roest
- Teldupostur frá HIMR

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12-2019 |
| Fundardagur | 11. september 2019 kl. 19:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Bók lisin**

**Fundur lokin**

Anita Vibergsdóttir

Bogi Johannesen

Súsanna Bertholdsen

Alvi Mortensen

Kristina Roest

Annika Pearce

Arnfinn Leo